# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Vetur og ferðsla

Hóast vetrarveðrið ikki er komið fyri seg enn, so er tíðin við at nærkast til at lata seg í og skoða seg til hesa í ferðsluni øðrvísi og eisini vandafullari tíð. Betur fyrivarin enn eftirsnarin er eitt gott orðafelli og sera væl hóskandi fyri veturin sæð í einum ferðsluhøpi.

Hálka, svartakálk og kavi eru alt nakað, sum vit eiga at leggja okkum væl í geyma, tá vit seta okkum í bilin og fara út á alfaraveg. Ymsar eru meiningarnar um, hvussu vit eiga at skoða bilarnar, men so leingi tað er loyvt, so vilja tað vera tey, sum velja píkarnar fyri at kenna seg trygg. Onnur koyra so við heilársdekkum.

Tá samanum kemur so hevur hetta tó nógv fyri at siga alt við tað at gera rætt og slætt at koyra eftir umstøðunum. Hetta er tó lættari sagt enn gjørt fyri mong, sum nærum skulu hava ein kvøkk, áðrenn tey leggja sær hetta nóg væl í geyma, nevniliga at vegirnir eru hálir og tí seta heilt onnur krøv til bilføraran.

Alt hetta eiga vit at taka hædd fyri og líkasum innstilla koyriradaran av nýggjum. Hetta sjálvandi fyri okkara egna tryggleika men ikki minst fyri onnur, sum antin koyra ella eru til gongu í ferðsluni. Eisini og ikki minst bussførarar, sum hava ábygdina av mongum fólkum í sínum arbeiði, eina geva øllum hesum ans. Vit kunnu so bara fegnast um, at so fáar álvarssamar vanlukkur hava verið á lands- og bygdavegunum í kollektivu ferðsluni. Hesum kunnu vit so takka vælskøddum bussum og hegni bussførarans fyri.

Tey, sum eru til gongu, mugu so sanniliga eisini geva sær fær um broyttu árstíðirnar, og her kemur eisini myrkur inn í myndina. Og her eru ráðini eittans: at brúka endurskyn. Nú hetta kæra og vælvalda orðið hevur fingið pláss í málinum, er bara at vóna, at tað eisini fær pláss í okkara hugaheimi, soleiðis at tað er tað mest náttúrliga ting verðini at hava enduskyn á okkara pløggum. Her ikki minst at læra børnini og tey smáu, at endurskyn er og skal vera ein náttúrligur partur av klæðunum, tá tey ferðast úti, har akfør eru. Hetta kann ikki sigast ov oftani, og nú rúsdrekkalógin varð broytt til at tú so gott sum einki kann drekka koyrir tú bil, so átti kanska at verið lóggivið um, at børn og ung sum eitt minstamark skulu bera endurskyn. Er hetta ikki bara ein spurningur um at broyta hugburð!

Hóast vit enn kunnu gleðast um sólstrálurnar, sum kaga niður millum skýggini, so vita vit, at veturin við hálku og kava nærkast. Hetta er ein veruleiki, sum vit tí eisini mugu til at fyrihalda okkum til – at liva og bera okkum at eftir broyttu umstøðunum.

Ein vetur uttan óhapp og vanlukkur í ferðsluni er ein gáva til okkum øll. Latið okkum geva hvør øðrum hesa gávu.

**Sosialurin**

## Vil Javnaðarflokkurin nakað sum helst?

JASPUR VANG
løgtingsmaður



**Blekkið, sum væl úr hondum greidda álitið »Kommunur, eindir og uppgávur 2009« er skrivað við, var neyvan turt, áðrenn Javnaðarflokkurin, hóast hann er í samgongu, í sjálvdrátti alment byrjaði at taka frástøðu frá grundleggjandi pørtum í álitinum.**

At niðurstøðurnar, sum Javnaðarflokkurin higartil er komin til, eru undanstøkking og beinleiðis í stríð við samgonguskjalið, ger ikki støðuna betur.

### Samgonguskjalið

Tá skotið varð upp at tiðnað ríkisveitingina, var Javnaðarflokkurin í øðini í royndunum framhaldandi at niðurlaga ríkisveitingina og harvið fasthalda fullveldistilgongdina. Javnaðarflokkurin skeyt Sambandsflokkinum í skógvarnar, at Sambandsflokkurin gekk ímóti samgonguskjalinum. Nú tað snýr seg um kommunalreformin, gongur Javnaðarflokkurin sjálvur beint ímóti samgonguskjal inum. Í samgonguskjalinum, sum Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin og eisini Javnaðarflokkurin undirskrivaðu fyri einum góðum ári síðani, stendur nevniliga orðarætt:

*»Samgongan fer undir ein kommunureform vísandi til samtykta talið av kommunueindum. Reformurin verður settur í verk 1. januar 2011. Innihaldið í reforminum er fíggjarlig útjavningarskipan, blokkstuðul og flyting av ábyrgdarøkjum frá landi til kommunur.*

*Kommissión, sum skal vera liðug á ólavsøku 2009, verður sett at fyrireika:*

- *Útjavning*
- *Blokkstuðul*
- *Allýsing av ábyrgdarøkjum, so sum eldraøkið, fólkaskúlin, vegakervið og aðrar uppgávur, sum kunnu flytast kommunum at umsita*

*Broytingarnar í kommunubygnaðinum skulu geva øllum økjum í landinum møguleika fyri at mennast í javnvág«.*

Tí er tað beinleiðis óseriøst og í stríð við samgonguskjalið, nú Javnaðarflokkurin meldar út, at skattaskipanin skal broytast, heldur enn seta í verk eina blokkstuðulsskipan millum kommunuranr og landið, soleiðis sum Javnaðarflokkurin annars hevur bundið seg til í samgonguskjalinum, og at kommunureformurin ikki eigur at verða settur í verk 1. januar 2011, soleiðis sum Javnaðarflokkurin annars eisini hevur bundið seg til í samgonguskjalinum.

Javnaðarflokkurin mælir hinvegin til, at kommunalreformurin ikki verður settur í verk fyrr enn eftir næsta regluliga kommunuval, sum verður í november mánaða 2012. Vónandi er tað ikki soleiðis, at tað er atlitið til tær uml. 2000 atkvøðurnar hjá javnaðarborgarstjóranum í Havn, mótstøðan úr Havn ímóti einari útjavningarskipan og valdið á kommunustýrunum í eitt nú Tórshavn, Skopun, í Porkeri, á Tvøroyri og í Vági, sum eru orsøk til, at Javnaðarflokkurin tagar álitið um ein kommunalreform sundur og støkkur undan samgonguskjalinum.

### Spæl fyri gallarínum

Um so er, at Javnaðarflokkurin ikki vil leggja kommunurnar saman við lóg pr. 1. januar 2011, seta í verk eina blokkstuðulsskipan og eina inntøku- og útreiðsluútjavning millum kommunurnar, soleiðis sum avtalað er í samgonguskjalinum, skal hann melda greitt út beinan vegin, heldur enn at halda sínar samgongufelagar og Føroya Fólk fyri gjøldur í einum eftir øllum at døma komandi aðalorðaskifti.

Tilgongdin fram ímóti at leggja kommunurnar í landinum saman hevur nú staðið við í eini 20 ár, eins og tvey álit eru skrivað. Stundin er komin at avgreiða hettar so týdningarmikla mál. Atgerðarloysi og taktisk politiskt spæl fyri gallarínum ber ongan veg.

### Taktikkur heldur enn politikkur

Var tað ein ábyrgdarleysur andstøðuflokkur, sum í tíð og ótíð fór út í fjølmiðlarnar at profilerað seg, hevði tað verið skyljandi. At ein Javnaðarflokkur í samgongu, uttan at hava tosað við sínar samgongufelagar, og áðrenn veruliga viðgerðin av málinum er byrjað, fer út í fjølmiðlarnar og alment leggur seg fastan á nøkur grundleggjandi sjónarmið, sum tað neyvan ber til seinni at tillaga sjónarmiðunum hjá øðrum politiskum flokkum, uttan at Javnaðaflokkurin tá kemur at standa sum tapari, er í mínari verð ein greið ábending um, at lítil og eingin vilji er til finna eina breiða semju í hesum álvars máli. Við øðrum orðum, so tykist tað púra greitt, at taktikkurin verður raðfestur fremri enn politiskur úrslitini hjá samgonguni.

### Seinasta veljarakanningin

Fyrst vóru vit vitni til, at formaðurin í Javnaðarflokkinum framlegði eitt fíggjarlógaruppskot, har flestu áhugabólkar í samfelgnum fáa eitt sindur, meðan eingin, uttan nakrir pensionistar, skulu rinda nakað av týdningi, samstundis sum hallið á fíggjarlógini nærkast einari milliard krónum annað árið á rað. Nú verður álitið um "Kommunur, eindir og uppgávur" so taga sundur og kolldømt. Spurning urin er, um Javnaðarflokkurin vil nakað sum helst.

Seinasta veljarakanningin, sum gav Javnaðarflokkinum ein framman á, er helst tað ringasta, sum er hent hesari samgonguni. Taktisku útspælini frá Javnaðarflokkinum, heldur enn semjusøkjandi realpolitikkur, eru uttan iva eru ein beinleiðis fylgja av vánaliga úrslitinum, seinasta veljara kanningin gav flokkinum.

### Bill Cosby og Javnaðarflokkurin

Havandi í huga fíggjarlógaruppskotið, sum fyriliggur, og nú undanstøkkingarnar í samband við kommunureformin, renna mær til hugs orðini hjá amerikanska filmsleikaranum Bill Cosby, tá hann fyri stuttum í einum av okkara fjølmiðlum varð endurgivin fyri at siga, at "*hann ikki kennir lykilin til succes, men at lykilin til fiasko er at royna at gera øll nøgd.*

Talan er um vísdómsorð. Tí eingin samgonga fer nevniliga at megna at venda hallinum á føroysku fíggjarlógini, ella at fremja ein kommunureform í verki, um samgongan, ella partar av henni, einans hava sær fyri eyga at royna at gera øll nøgd. Tað ber snøgt sagt ikki til í politikki. Atgerðarloysi og royndirnar at tekkjast øllum landsins veljarum samstundis, kann bert føra til politiska fiasko.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.